Fróðskaparsetur Føroya

15. desember 2005

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 11/2005

Tíð: Hósdagin 15. desember 2005, kl. 13.00-14.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 10/2005 setursráðsfundi 29. november 2005.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarlóg 2006. Støðutakan til raðfestingar.** (J.nr. 0015-01595). *Fundarskjal: Uppskot til fíggjarbýti, dagfest 15.12.05, 13 s.* Nakrar broytingar í fíggjartørvinum í mun til metingina í summar í sambandi við fíggjarlógarumsóknina. Uppskotið er sama játtan sum í 2005. Setursráðið metti ikki at rúm er fyri nýggjum virksemi í 2006 sum metti fíggjartørvurin er í løtuni. Møguliga bjóða onkur stakskeið út komandi heyst í KT-frøði og løgfrøði, um rúm vísir seg at vera seinni á árinum.

4. **Upptøka til lestur lestrarárið 2006/07.** (J.nr. 0040-01759). Upptøkur verða til søgu, stjórnmálafrøði, føroyskt og til lívfrøði. Neyðugt at fáa vissu fyri nøktandi undirvísingarhølum sum skjótast.

5. **Tilmæli til limir í Búskaparráðið.** (J.nr. 0011-01742). *Fundarskjal: Uppskot til tilmæli AS, 5 s.* Onkrar rættingar skulu gerast í orðingunum, annars var tikið undir við uppskotinum. Tilsøgn manglar frá onkrum av evnunum. Setursskrivarin arbeiðir víðari við málinum, sum verður avgreitt millum funda.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

6. **Tilmæli frá Náttúruvísindadeildini um at leingja starvssetan í sambandi við ph.d.-verkætlan við 3½ mánaði.** (J.nr. 0043-01083, 0024-01015). Uttanseturs fíggjað verkætlan, fígging er tøk til 15. februar. Avgerðin hjá MNVD staðfest.

7. **Fundaætlan várhálvu 2006.** (J.nr. 0011-01481). Fundirnir vera 26.1., 23.2., 30.3., 27.4., 18.5. og 22.6.

8. **Uppskot frá Søgu- og Samfelagsdeildini um umbygging í Reins Húsi.** (J.nr. 0033-01762). *Fundarskjal: Brœv frá SSD, dagfest 14.12.05, 1 s.* Setursráðið metti ikki at talan var um eina góða loysn fyri húsið. Mælt varð ístaðin til at kanna møguleikarnar fyri at samskipa undirvísingina hjá SSD og NVD á NVD í vár, ella at flyta undirvísingina í tøku hølini undir Krákugjógv.

9. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
    a. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 1.12.05.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
    b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 13.12.05.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

10. **Eftir tilmæli frá Náttúruvísindadeildini er Mentamálaráðið biðið hesum hesa próvdómaragóðkenning: Egil Tjåland, Ph.D. í jarðalisfrøði, lektari á Universitetet i Trondheim til skeið *Innan kolvetnisalisfrøði.* At staðfesta.** (J.nr. 0026-01525). Staðfest

**Kunningarmál:**

11. **Kunning frá Løgmansskrivstovuni um norðurlendskt umbýti 2006 av starvsfólki í landsfyrisitingini. Føroya fáa tillutaðar 118.000 kr. í 2006, freist at søkja er 1.2.06.** (J.nr. 0029-00363).

12. **Álmanakkin 2006, H.N. Jacobsens Bókahandil.**

13. **Hans Birgir Højgaard, KT-leiðari, hevur sagt seg úr starvi pr. 1. mars 2006. Søkt verður eftir nýggjum KT-leiðara.** (J.nr. 0022-01430).

Frágreiðing: Annika Sølvará